## VIÐMERKINGAR

# Skalt tú stýra einum landi - mást tú kunna stýra tær sjálvum

**Kristina Háfoss**
*Løgtingskvinna fyri Tjóðveldisflokkin*



Hvat hendið og hví ? - Hetta eru spurningar, ið nógvir føroyingar seta sær eftir at Anfinn Kallsberg, løgmaður, sleit samgonguna og skrivaði út nýval í undanfarnu viku.

**Løgmansgølan - lygnin og tignin**
Á Ólavsøku 2002: Anfinn Kallsberg, løgmaður, boðaði frá, at løgmansembætið og politiska skipanin kundi ikki liva við, at misstanki varð sáddur um, at hann skuldi hava framt lógarbrot í fortíð síni. Hann varð tí til reiðar at leggja frá sær, um tingmaður hjá Tjóðveldisflokkinum ikki tók aftur eina ákæru mótvegis løgmanni í eini grein, ið varð at lesa í bløðunum.

Í desember 2003: Anfinn Kallsberg viðgongur at hava fram lógarbrot. Hetta aftaná at bókin 'Skjót journalistin' hevur avdúka skjalafalsan og fíggjarligan undandrátt sum part av fortíð løgmans. Harvið viðgongur Anfinn Kallsberg at hava logið og missnýtt embæti sítt á Ólavsøku 2002. Hann nýtti vald sítt at trýsta samgonguumboð at taka aftur ákærur um fortíð hansara, í eini roynd óbeinleiðis at reinsa fortíð løgmans. Eisini kundi nú staðfestast at løgmaður, í hesum valskeiðnum, fleiri ferðir alment hevur logið um fortíð sína.

**Gølan týdning í 2002 - men ongan týdning 2003 ?**
Hóast bert misstanki um lógarbrot varð nógmikið til at fáa løgmann til at leggja frá sær á Ólavsøku 2002 - fyri at varðveita álitið á politisku skipanina og fólkaræðið - ja, so hevði løgmaður í ár snávað 180 stig. Tí nú tað varð prógvað at hann hevði ikki bert framt lógarbrot, men somuleiðis logið og missnýtt sítt embæti meðan hann hevði sitið sum løgmaður - ja, nú hevði tað við eitt ongan týdning fyri virðingina og álitið hjá løgmansembætinum og poltisku skipanini, hvørt hann persónliga varð sitandi sum løgmaður ella ikki.

**Løgmaður helt áfram við at missnýta sítt embæti.**

1) Fyrst umvegis tingmanning Fólkafloksins, ið kom við brævi til Tjóðveldisflokkin eina viku undan útgávuni av eini bók, ið ongin kendi innihaldið av. Brævið varð eitt stórt álop á Tjóðveldisflokkin, og ein roynd at fáa vent almenna áhugan frá bókini og avdúkingum hennara, mótvegis Tjóðveldisflokkinum, ið onki hevði við hesa bókina at gera. Ein politisk roynd at dylja yvir sannleikan og fortíð løgmans.
2) Tá bókin gjørdist almenn, nýtti løgmaður enn einaferð sítt embæti til eitt persónsmál, ið varð millum hann og rithøvundarnir. Hesuferð legði løgmaður eitt alment tíðindaskriv út á heimasíðuna hjá Løgmansskrivstovuni har hann royndi at undirgrava rithøvundarnir, ið skrivað hava bókina. Tittulin 'skjót journalistin' mátti enn einaferð sigast at hava rakt rætt.
3) Somuleiðis varð í tíðindaskrivinum lagdur dentur á, at løgmaður ikki hevði persónligan vinning av stuldrinum á eina knappa mió. kr., men at hesin hevði verið skipi og harvið manning at frama. Harvið gongur løgmaður á odda at tala fyri, at tað er í lagi at fremja stuldur um bert málið er tað rætta. Somuleiðis dylir løgmaður yvir, at varð hann ikki tvungin at rinda knøppu milliónina aftur - fyri soleiðis at sleppa undan tyngjandi rættarmáli - so hevði hann, umvegis feløgini, sanniliga havt vinning av stuldrinum.
4) Tjóðveldisflokkurin gav 5. des. 2003 løgmanni skriv har víst varð á, at Tjóðveldisflokkurin ynskti at halda áfram við samgonguni á sjálvbjargniskós, um bert samgongan varð umskipað undir nýggjum løgmanni. Hetta fyri at varðveita álitið á politisku skipanina og fólkaræðið. Men á tingfundi sama dag valdi Anfinn Kallsberg, løgmaður, enn einaferð at nýta sítt løgmansembæti til at velja sín persón fram um framhaldandi samgongu. Enn einaferð varð løgmansembætið missnýtt til at skriva út val í úrtíð hetta vegna eitt persónsmál - ikki eitt politiskt mál.
5) Og at hartil kemur, at tá løgmaður sá at hann hevði ein meirluta ímóti sær á Løgtingi, og harvið sambært Stýrisskipanarlóg Føroya átti at steðga við øllum politiskum avgerðum, valdi hann - enn einaferð - at misnýta sítt vald sum løgmaður, til at koyra 4 landsstýrismenn hjá Tjóðveldisflokkinum til húsa, og lata sínar egnu halda áfram til nýggj stjórn er skipað eftir valið. Varð henda avgerð løgd fyri Løgtingið at taka avgerð um, varð hon follin.

**Lagaligur Tjóðveldisflokkur**
Tjóðveldisflokkurin hevur verið sera lagaligur - helst ov lagaligur - í hesi og undanfarnu samgongu. Flokkurin hevur gjørt tað kann hevur verið mentur at náa teimum málum, ið samgongan setti sær, og hevur verið sera sjálvrannsakandi. Eitt nú tá Signar á Brúnni og Tórbjørn Jacobsen sjálvir fóru úr landsstýrissessum teirra fyri at teirra persónar ikki skuldu seta samgonguna uppá spæl.

Eisini hevur Tjóðveldisflokkurin livað við, at løgmaður einsíðis valdi at avlýsa fólkaatkvøðuna um fullveldiskósina í 2001. Somuleiðis at løgmaður á tingsins røðarapalli segði Føroya Løgtingi, at tað gjørdi nakað skeivt tá tað legði fram missálit á fyrrv. landsstýrismannin Jørgen Niclasen, hóast fellandi kanningarstjórafrágreiðing. Stutt eftir varð fyrrv. tjóðveldislandsstýriskvinnan Annlis Bjarkhamar koyrd úr sínum sessi av løgmanni uttan sakliga grundgeving, og við útgangsstøði í einum starvsfólkamáli. Nú landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur fingið nógvar ábreiðslur og kærur í samband við eitt starvsfólkamál hevur løgmaður valt onki at gera. Ferð eftir ferð hevur løgmaður sostatt prógvað, at hann ikki hevur verið leiðari fyri samgonguna, men fyri seg og sín flokk. Hetta hevur verið óvirðiligt og er at harmast um.

**Tað snýr seg um álit á politisku skipanina og fólkaræðið**
Tá løgmaður nú varð avdúkaður í at hava logið og missnýtt sítt embæti sum løgmaður, í eini roynd at reinsa sína fortíð og draga Tjóðveldisflokkin inn í hesa reinsan, varð farið langt um øll mørk. Álitið á politisku skipanina og fólkaræðið stóð uppá spæl.

Tjóðveldisflokkurin fer ongantíð at góðtaka lógarbrot og misnýtslu av politiskum valdi. Hetta undirgravar rættartrygdina, fólkaræðið og sjálvstýrisstríðið.

Skalt tú stýra einum landi er fyrsta fyritreytin, at tú kanst stýra tær sjálvum.

# Tunnilin er góður – prísirnir skulu niður

**Marjus Dam**
*løgtingsmaður*



Mykinesfólk siga, at Súlan er góð. Søgnin sigur, at um teir ikki siga tað, so missa teir súluna.

Eg rokni ikki við, at vit missa tunnilin, um vit krevja, at prísirnir fara á eitt støði, ið vit kunnu liva við. Sum er missur Vágoyggin sera nógv, tí prísirnir eru ov høgir hjá teimum, ið koyra nógv.

Tá tunnilin varð tikin í nýtslu, var rok um prísirnar. Vit søgdu, at prísaásetingin var púra ør. Tað hjálpti. Og flestu munnu ásanna, at vit høvdu rætt. Um hildið varð fast við upprunaligu prísirnar, so var tunnilin farin á heysin beinanvegin. Tí vágafólk vildu ikki nýtt hann - vit vildu siglt - púra greitt.

Strukturbroytingar vórðu gjørdar. Ístaðin fyri at hava 20 mill kr árliga, so skuldi pf Vágatunnilin hava 18,5 mill kr árliga fyri at svara hvørjum sítt.

Tí undrar tað stórliga, at vit í D&V hoyra, at »Neyðugt er við 25 mill kr árliga. Og bert pendlarnir fáa eitt betri tilboð á hesum sinni ...prísbroytingin verður í marts apríl«.

Tað kann als ikki góðtakast.

Neyðugt er at
- pendlarar skulu/mugu hava eitt gott tilboð.
- at betri rabatskipanir verða fyri allar hinar bólkarnar eisini.
- at prísniðursetingin verður so skjótt sum møguligt eftir 1. januar.

Tá neyðugt er at krevja 18,5 milliónir inn, so er ikki neyðugt at hava ein yvirprís fyri at fáa 6,5 mill kr ov nógv inn.

Eisini trúgvi eg, at gjógvin ímillum 18,5 mill kr og 25 mill, ið nú sigst skal til, má skapa ein forkláringstrupulleika hjá øðrum enn mær.

Ætlanin var at gjalda restskuldina upp á áleið 120 mill aftur upp á 15 ár.

Um 25 mill kr verða kravdar inn, so verða til tað tíð kravdar inn 375 milliónir krónur fyri at gjalda eitt lágrentulán aftur uppá 120 mill kr. T.v.s at rentur og rakstur eru 2 ferðir hægri enn lánið. Og tá er okkurt, ið er vindandi skeivt.

Eisini kann ein fýlast á, at prísniðursetingin ikki verður fyrrenn í »marts ella apríl«. Tá seinasta prísáseting varð gjørd í apríl, varð sagt, at hesir prísir vóru galdandi árið út. So ein væntar, at prísniðursetingin kemur so skjótt eftir 1 jan. sum gjørligt. Soleiðis at lægri prísurin fær fleiri at nýta tunnilin, til gagn fyri brúkaran, ið sum er rindar alt ov nógv.

Tunnilin er góður - men prísirnir eru ov høgir.

# Meðan vit rætta kumpass

**Niklái Petersen**
*løgtingsmaður*



Eftir løgtingsvalið í 1998 var fullveldislandstýrið skipað millum Tjóðveldisflokkin, Fólkaflokkin og Sjálvstýrisflokkin. Hesir settu sær fyri, at nú skuldi kósin setast á fullveldisleið, skútan varð mannað, kumpassin rættað, og kósin sett.

Tað gekk væl tey fyrstu árini, heilt fram til 2001, tá fólkaatkvøðan varð avlýst. Eftir valið í 2002 varð so sjálvstýrislandstýrið skipað millum Tjóðveldisflokkin, Fólkaflokkin, Sjálvstýrisflokkin og Miðflokkin.

Síðani tá er deviatiónin á kumpassini bara vaksin og vaksin, misvísningurin tikið yvirhond, og ilt hevur verið at hildið kós og ferð og komið ræ私tan veg móti tí knattstøðu, sum var sett út í kortið.

Sjálvstýrarin hevur verið óálítandi og sligið frá fleiri ferðir, skiparin á skútuni hevur ivast, hvør kósin skuldi verða, helst tí misvísningurin bleiv ið so stórur, og tískil hevur gingið striltið tann rætta vegin.

Hóast tað, so hevur gingið rætta vegin kortini, ferðin hevur verður lakari, men fram kemur tann, ið hóvliga fer, sum orðatakið sigur, so ikki er at missa mótið men halda treystliga áfram.

Byrðurin hevur ikki verið góður seinastu tíðina, nógv sjask ímóti og lítil framdrift, men málið má ongantíð kámast burtur, tað er og verður altíð har.

Afturhaldið hevur besta hugin at taka hann undan , tað er behagiligari at lensa, men tá kemur einki í lastina.

Nú er aftur tíð at rætta kumpassina, tað hevur allar tíðir verið góður sjómansskapur at rætta kumpass av og á fyri at koma aftur á beint, tað er einki forgjørt í tí.

Vónandi er so frægt av seiggi eftir í tí føroysku sjálvbjargningssálini, nú tað rekur hart á kýkin.

Við tjóðveldiskvøðu.



# Heimurin kemur til Setrið

**Føroyskt er eitt mál sum øll onnur, sigur Turið Sigurðardóttir, sum komandi summar stendur fyri tí fyrsta altjóða skeiðinum á enskum um føroyskt mál, mentan og bókmentir á Fróðskaparsetri Føroya. Skeiðið er á universitetsstigi og gevur góðkenning hjá lærdum stovnum**

UNDIRVÍSING
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*




*Turið Sigurðardóttir, deildarleiðari á Føroyamálsdeildini, og Jákup Sørensen, fulltrúi, hava fyriskipað fyrsta altjóða skeiðið í føroyskum á Fróðskaparsetrinum*
*Mynd: Jens K. Vang*

So løgið tað ljóðar, so er stórur áhugi úti í heimi at læra um føroyskt mál og mentan á universitetsstigi. Tað hava bæði Fróðskaparsetrið og Altjóða skrivstovan, sum hevur fingið nógvar fyrispurningar uttanlands, sannað.

Hesum áhuga gongur Fróðskaparsetur Føroya nú á møti. Komandi summar skipar Fróðskaparsetrið fyri fyrstu ferð fyri einum skeiði nevnt »Faroese summer institute«, har undirvíst verður í føroyskum máli, bókmentum og mentan í døgunum frá 5. til 27. juli.

Summarskeiðið gevur 8 stig á sonevnda ects-stiganum, ið stendur fyri European credit transfer system. Ein lestrarhálva telur 30 stig.

**Heilt úr Kina**
Fróðskaparsetrið hevur skipað fyri líknandi skeiðum á norðurlendskum síðan 1970, men nú verður farið víðari út í heim. Norðurlendsku skeiðini hava verið fíggjað av Norðurlandaráðnum, men nýggju skeiðini verða fíggjað av teimum lesandi sjálvum, greiður Jákup Sørensen, fulltrúi á Setursskrivstovuni frá.

– Vit hava longu fingið tríggjar fyrispurningar um luttøku í dag, tí skeiðini eru boðin út á heimasíðu okkara. Ein fyrispurningur er enntá komin heilt úr Kina. Vit fáa dag og dagliga fyrispurningar, har fólk spyrja, um til ber at koma higar at lesa, og hetta er so ein roynd at ganga hesum ynskjum á møti, sigur Jákup Sørensen.

**Góð umboðsfólk**
Turið Sigurðardóttir, deildarleiðari á Føroyamálsdeildini, sum er lektari í bókmentum, hevur lagt skeiðið til rættis innihaldsliga. Hon heldur tað hava stóran týdning fyri Føroyar, at fólk koma hendanvegin at lesa.

– Vit hava skipað fyri norðurlendskum skeiðum síðan 1970. Nógv hava hildið fram at havt áhuga fyri føroyskum viðurskiftum, og tey eru vorðin eitt slag av umboðsfólkum fyri okkum. Tey koma aftur og nøkur gerast gestalærarar. Nøkur undirvísa í føroyskum uttanlands. Tað hevur havt stóran týdning fyri okkum, og vit vóna, at hetta altjóða skeiðið fær sama týdning, sigur Turið Sigurðardóttir.

Eini 30 fólk hava luttikið hvørja ferð á hvørjum skeiði, og talið verður nakað tað sama á tí nýggja altjóða skeiðunum. Men hví tíma útlendingar yvirhøvur at koma hendanvegin at kunna seg um okkara lítla mál og mentan?

– Føroyskt er eitt mál sum øll onnur. Hjá teimum, sum lesa germanistikk, er tað serliga áhugavert at granska felags eyðkenni. Tað sama er galdandi fyri tey, sum lesa norðurlendskt, tí vit eru eitt norðurlendskt mál. Tey, sum lesa málvísindi, skulu eisini duga fleiri mál. Tey granska ljóð og bygnað í málinum, og tá er føroyskt eins áhugavert sum onnur mál – hjá summum kanska uppaftur áhugaverdari, sigur Turið Sigurðardóttir.

**Romantiskar sálir**
Kanska hava fólkini, sum koma hendanvegin at lesa, hóast alt nøkur felags eyðkenni.

– Tey flestu eru nakrar romantiskar sálir, sum vilja sleppa langt burtur til eitt lítið fólk og eina stórsligna náttúru. Summarskeiðið er sjálvandi bygt upp á eitt fakliga dygdargott støðið, men samstundis bjóða vit eisini eitt mentanarligt tilboð, sigur Turið Sigurðardóttir.

Tað kostar 4500 krónur at luttaka á skeiðnum, men møguleiki er fyri at fáa stuðul. Harafturat skulu tey lesandi eisini rinda fyri uppihald og innivist.

# Hátíðarhalda 100 ára dagin hjá Kvívíkar kirkju

**Í morgin, 3. sunnudag í advent kl. 16.30, verður skipað fyri konsert í Kvívíkar kirkju í samband við at tann dagin verður Kvívíkar kirkja 100 ár**

JÓL



Tað er Vestmanna Sangkór, við nøkrum sangarum úr Kvívík, sum eigur høvuðspartin av skránni.

Fyri at markera 100 ára dagin hevur Kvívíkar kirkjuráð heitt á kórleiðaran Kára Bæk at fáa okkurt nýtt framført til hátíðarkonsertina, og hevur hann vent sær til teir tríggjar, Edvard N. Debess, Atla K. Petersen og Kristian Blak, og biðið teir gera nýggjar útsetingar av ávísum advents- og jólasálmum, fyri kór og 3 blásiljóðføri - floytu, klarinett og fagott.

4 nýggjar útsetingar av jóla- og adventssálmum komu burturúr, umframt tveir, sum kórleiðarin sjálvur hevur gjørt. Tær nýggju útsetingar fyri kór og blásaratrio eru:

- Sum ein føgur rósulund, Hartmann / Kristian Blak
- Í hesi sælu jólatíð, gl. før. sálmalag / Kristian Blak
- Av himni kom ein einglaherur, gl. før. sálmalag / Atli K. Petersen
- Eitt barn er førr í Betlehem, týskt vísulag / Edvard N. Debess
- Ver glað nú, Brúður Krists, Jac. Regnart/Kári Bæk
- Byrja nú við trúgv og treysti, Lindemann / Kári Bæk

Onkrar av útsetingunum eru reiðiliga ótraditionellar og hava fingið eitt meira moderna snið.

Á skránni er annars brot úr motettini »Harri vár drottin«, fyri solo, kór og orgul, sum Kári Bæk skrivaði til 1000-árahaldið í 2000. Petra Iversen syngur solo og orgulfylgispælið hevur Heðin Kambsdal.

Kórið syngur eisini saman við orglinum Christmas Lullaby hjá John Rutter.

Sunnuva Bæk fer at spæla Exultate Jubilate hjá Mozart, lagt til rættis fyri trompet og orgul.

Í Kvívík er eitt lítið barnakór, sum hevur eini 3 ár á baki. Tey fara eisini at luttaka, bæði við egnari skrá og saman við Vestmanna sangkóri. Tað er Petra Iversen, sum í løtuni venur barnakórið.

Aðrir tónleikarar, sum luttaka, eru: Andrea Heindriksdóttir, floyta, Peder Riis Jensen, klarinett og Christine Andersen, fagott. Konsertin verður endurtikin í Vestmanna mánakvøldið tann 15. des. kl. 20.00 í Vestmanna kirkju.

## Jólakonsert í Vestmanna mánakvøldið

JÓL

Mánakvøldið tann 15. des. kl 20 verður konsert í Vestmanna kirkju.

Tað verður við Vestmanna Sangkóri við nøkrum sangarum úr Kvívík, barnakóri úr Kvívík, solistum og tónleikarum. Kári Bæk stjórnar Vestmanna Sangkóri, og Petra Iversen stjórnar barnakórinum, umframt at hon eisini er solistur.

Fleiri av sangunum verða við tónleiki, har tónleikararnir verða Heðin Kambsdal, orgul, Andrea Heindriksdóttir, floyta, Peder Riis Jensen, klarinett, Christine Andersen, fagott og Sunnuva Bæk, trompet. Skráin fyri konsertina verður tann sama sum fyri konsertina í Kvívík dagin fyri í samband við 100-ára haldið fyri Kvívíkar kirkju.